# Kravið hjá toftamonnum er ein sigur

**Um B68 skal gera sær nakrar vónir um at bjarga sær sessin í bestu deildini, er neyðugt, at teir fáa eitt gott úrslit, nú farið verður undir seinnu hálvu**

B68-KÍ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Ove Nysted er hægstur í dysti á Svangaskarði, og klaksvíkingar vóna eisini, at teir verða omaná í dystinum í kvøld.*

B68 er á aftasta plássi í landskappingini, og liðið hevur bert ognað sær tað eina stigið higartil í ár. Í summar hava teir so eisini roynt seg í UEFA, og heldur ikki har var talan um nakra serliga úrtøku, tí samanlagt vóru teir bastir 11-0 av lettiska Ventspils, sum í næstu umfari av europeisku kappingini skal dystast við danska Brøndby.

### Tveir brasiliumenn við

Leiðslan í B68 hevur ikki ligið á tí løtu síðuni í summar, og felagið hevur útvegað sær ikki færri enn tríggjar brasilumenn seinastu fimm vikurnar, og spennandi verður at síggja, hvussu hesir fara at standa seg í føroysku landskappingini.

Í kvøld verða bert tveir av brasilumonnunum, Anderson og Fabricio, at síggja á vøllinum, tí tann nýggjasti maðurin úr stóra landinum í suðurameriku, Luis, enn ikki hevur fingið pappírini hjá sær í rættlag. Tí noyðast toftamenn at bíða eina tíð enn, áðrenn teir síggja hann á vøllinum.

Hinvegin harmast teir í B68 um, at Herbert í Lon Jacobsen ikki verður at síggja á liðnum fyribils, og eisini at Mikkjal Thomassen heldur ikki verður við í kvøld, tí at hann hevur trupulleikar við hælsinuni. Á plussíðuni kann hinvegin staðfestast, at Bogi Petersen, sum hevur verið skaddur, allarhelst er tøkur aftur til dystin í kvøld.

Ein av royndastu leikarunum hjá B68, Oleif Joensen, sigur, at dysturin móti KÍ í kvøld er av stórum týdningi fyri B68. Oleif sigur, at um B68 ætlar sær lív lagað í 1. deild, so er tað eitt krav, at teir vinna dystin á klaksvíkingum. Somuleiðis heldur Oleif eisini, at tað hevur sæð betur út undir venjing hjá B68 seinastu tíðina, og tí eru vónirnar ikki sørar undan dystinum í kvøld á Svangaskarði.

### Klaksvíkingar væl fyri

Hjá klaksvíkingum hevur tað sæð gott út seinastu tíðina. Í tveimum venjingardystum móti donskum superligafeløgum, Esbjerg og FC Keypmannahavn, hava klaksvíkingar fingið fulla úrtøku, og harafturat vunnu teir seinasta landskappingardystin undan steðginum sannførandi 6-1 á ÍF í Fuglafirði. Hinvegin gekk tað minni gott, tá ið KÍ royndi seg á ólavsøku móti Skála, tí har fingu teir ein ordans umgang og taptu 1-5.

Jákup Mikkelsen, málverji hjá KÍ, sigur, at teir hava góðar vónir, nú farið verður undir seinnu hálvu av landskappingini. Landsliðsmálverjin sigur, at allir mans hjá KÍ eru klárir til dystin í kvøld uttan vágamaðurin Elfinn Ørvarodd, ið fekk ein snudd í venjingardysti móti leirvíkingum í farnu viku. Veteranurin Jan Andreasen fekk eisini ein skaða í sama dysti, men roknað verður við vissu við, at hann verður við á Svangaskarði í kvøld. Jákup Mikkelsen sigur, at tað hevur gingið væl betur í seinastuni, og eftir hansara tykki eru klaksvíkingar leikliga við at verða har, sum teir eiga at verða. Hann heldur eisini, at tapið móti Skála á ólavsøku var ein góð ávaring um, at hóast tað hevur gingið væl í venjingardystunum, so fær man einki forerandi.

### KÍ hevur tað trupult á Svangaskarði

Verður hugt at hagtølunum, so hevur KÍ tað trupult á Svangaskarði. Seinastu fýra ferðirnar, at klaksvíkingar hava vitjað B68, eru teir farnir tómhentir um Leirvíksfjørð aftur. Ikki síðani 1999, tá ið KÍ vann greipuna, hevur tað eydnast KÍ at vinna á Toftum. Tá vunnu klaksvíkngar tepurt 3-2, meðan teir árið eftir blivu avsmurdir 6-1. Í 2001 vann B68 4-0, í 2002 2-0 og í fjør vunnu toftamenn 3-1.

# Sundalagsmenn hava gott tak á B36

**Tað er ongantíð lætt hjá útiliðunum, sum vitja EB/Streym á Mølini, og í kvøld verður neyvan nakað undantak, tá ið eitt skert B36-lið kemur norð á vitjan.**

EB/STREYMUR-B36
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

B36 hevur tað mangan trupult móti sundalagsmonnum. Ikki tí, tá ið liðini bæði hittust í Gundadali í fyrsta dystinum í hesum kappingarárinum, var havnarfelagið greitt omaná og vann ein tryggan 4-0 sigur. Men verður hugt bara eitt vet longur aftur í søgubøkurnar, so sæst, at í fjør vann EB/Streymur báðar dystirnar móti árstalsfelagnum úr Havn við trimum málum móti einum!

### Skert B36-lið

Tað verður uttan iva eitt skert B36-lið, sum fer norður til Eiðis - spurningurin er bara, hvussu skert tað verður? Málverjin hjá B36, Tróndur Vatnhamar, sigur, at teir báðir, Arnbjørn Danielsen og Bárður Mortansson, neyvan verða at síggja á vøllinum í kvøld, og harafturat er eisini stórur ivi um landsliðsleikararnar Johannus Joensen og Pól Thorsteinsson.

Tróndur Vatnahamar sigur, at talan er um ein truplan dyst á Eiði, og hann ásannir eisini, at B36 ikki altíð hevur havt bestu úrtøkuna móti EB/Streymi. Hann sigur, at teir mangan hava havt lyndi til at undirmeta sundalagsmenn, og tí krevur tað, at hugburðurin er í lagi í kvøld, tá ið farið verður á vøllin, tí at annars gongur galið, heldur Tróndur Vatnhamar.

Spurdur um tað hevur nakra ávirkan, at B36 hósdagin var fyri stórtapi á útivølli í Letlandi í UEFA-Cup, sigur Tróndur Vatnhamar, at tað hevur tað ikki, tí teir allatíðina væntaðu at tapa, og tað var ein heilt annar dystur, sum einki hevur við dystin í kvøld at gera.

### Sundalagsmenn hava tikið sær av løttum

Liðskiparin hjá EB/Streymi, Jákup Martin Joensen, hevur góðar vónir undan dystinum í kvøld. Hann sigur, at tað sær hampuligt út hjá felagsliðnum, hvat viðvíkur skaðum. Einasti spælari, sum við vissu ikki fær spælt, er Fróði Clementsen, tí hann hevur fingið ein fipurskaða. Onkrir aðrir hava smásnuddir at dragast við, men Jákup Martin heldur ikki, at tað fer at forða nøkrum av teimum í at spæla dystin í kvøld.

Ikki hevur verið gjørt tað stóra við venjingina norðuri á Eiði í summar. EB/Streymur var ein túr á venjingarlegu í Italia, men tann túrurin var meiri ein sosialur túrur heldur enn ein venjingarlega, og vit sluppu veruliga at taka okkum av løttum, greiðir Jákup Martin Joensen frá.

Eftir ólavsøka hava teir hjá EB/Streymi tó vant sera hart tríggjar ferðir, men Jákup Martin heldur ikki, at tað ger nakar, at teir hava fingið loyvi til at taka sær av løttum í summar, tí so eru teir ikki troyttir av fótbólti, sum onkur annar kanska er tað.



*Ronnie Samuelsen er her avmyndaður í EB/Streyma búna, men í kvøld verður hann við á vitjandi liðnum, tá ið B36 kemur til norður til Eiðis*





*Bill McLeud Jacobsen er annar av venjarunum hjá føroyska U17 landsliðnum*
*Mynd: Álvur Haraldssen*

# U-17 dreingirnir í eldin

**Í dag fer føroyska U-17 landsliðið í fótbólti undir NM-kapping í Finlandi, har sterk mótstøðulið bíða**

U-17 LANDSLIÐIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í hesum døgum er NM-kapping fyri U-17 landslið í fótbólti í finska býnum Vaasa. Føroyingar eru eisini farnir til Finlands at kappast, og fýra dystir eru á skránni hjá teimum.

### Sterk mótstøðulið

Í dag verður farið undir kappingina, og í sínum fyrsta dysti skal føroyska U-17 landsliðið taka dystin upp við danir. Dysturin verður leiktur klokkan hálvgum sjey í kvøld lokala tíð.

Næsti dysturin hjá føroyska liðnum verður longu í morgin, og tá er tað eingin minni enn Ongland, ið er mótstøðuliðið, so tá fáa føroysku unglingarnir av álvara roynt seg. Seinasti dysturin hjá føroyska liðnum í sjálvum bólkaspælinum verður leiktur fríggjadagin, tá ið mótstøðuliðið er Svøríki.

Sunnudagin skulu føroyingarnir so leika plaseringsdyst, alt eftir hvussu teir hava staðið seg í bólkaspælinum. Føroyska ferðalagið fór úr Føroyum sunnudagin, og tey verða aftur á klettunum komandi mánadag.

### Átta feløg hava umboð á liðnum

Teir báðir landsliðsvenjararnir, Heðin Askham og Bill McLeod Jacobsen, hava úttikið 18 leikarar til kappingina, og hesir leikarar umboða átta ymisk feløg. Best umboðaði á liðnum eru tey bæði havnarfeløgini, sum hvør hava fýra leikarar í hópinum. Teir 18 leikararnir eru hesir: Rógvi Rygshamar LÍF, Tonny Kruse og Brian Hansen EB/Streymur, Jóhan Davidsen, Einar Hansen og Bogi Løkin NSÍ, Sigtór A. Petersen FS Vágar, Kristoffur Jacobsen og Mathias Samuelsen KÍ, Ólavur í Ólavstovu, Pætur T. Jørgensen, Christian R. Mouritsen og Torkil Kollsker HB, Levi Hansen, John Hansen, Rói Mohr Danielsen og Johan Ellingsgaard B36, Jón Krosslág VB. Ferðaleiðari á túrinum er Rúni Heinesen, meðan Thom Jakobsen er liðleiðari. Fanny Kruse er við sum fysioterapeutur, og Páll Augustinussen skal royna seg sum dómara í kappingini.

Sosialurin fer at fylgja við, hvussu tað gongur hjá føroysku fótbóltsungdómunum í kappingini.

# Fótbóltsskúli í Klaksvík

**Í dag verður farið undir áhugaverda Football 04 fótbóltsskúlan í Klaksvík undir leiðslu av Andy Williams úr enska stórfelagnum Liverpool FC**

FÓTBÓLTSSKÚLI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er ein sera áhugaverdur fótbóltsskúli, ið klaksvíkingar skipa fyri. Høvuðsvenjari á skúlanum verður Andy Williams, sum til dagligt er ungdómsvenjari í enska Liverpool FC. Afturat Andy Williams fara fleiri av ungdómsvenjarunum hjá KÍ at taka sær av venjingini á fótbóltsskúlanum.

### 150 ungdómar tilmeldaðir

Tað eru ikki einans klaksvíkingar, ið verða við á fótbóltsskúlanum, tí opið hevur verið fyri tilmelding hjá øllum, sum hava havt áhuga fyri tí. Ikki færri enn 150 ungdómar hava boðað frá luttøku, og tey leggja til brots klokkan 10 í morgun.

Skúlin heldur áfram til og við hósdegnum, og hvønn dag verður byrjað klokkan 10 á morgni, og seinastu venjingarnar enda klokkan gott og væl fýra seinnapartin.

Til ber at fylgja við í, hvussu tað gongur á fótbóltsskúlanum á heimasíðuni, www.finneverton.com, har frásagnir og myndir frá venjingini verða at síggja.

# Spennandi kappríðing á ólavsøku

**Hóast nógvur mjørki var, so fingu áskoðarararnir til ólavsøkukappríðingina eina spennandi kapping**



**Trav:**

| Nr. | Navn: | Reiðmaður: | Eigari: | Tíð: |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Gletta | Marner Joensen | Jógvan Páll Egholm | 57,6 |
| 2. | Drotning | Knút Lützen | sjálvur | 61,5 |
| 3. | Stígandi | Heri Dahl | Kristian Debes | 61,8 |

**Tvíspor ung:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Faldur | Joan Hansen | Kalmar Lindenskov | 36,6 |
| 2. | Skenkur | Sólrun Andreasen | Gunnar Grækarisson | 37,5 |
| 3. | Huðin | Hildur á Plógv | Gudmund Hansen | 37,7 |

**Tvíspor II flokkur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Marengo | Øssur Andreasen | Petur Nolsøe | 37,9 |
| 2. | Geysa | Ann Michell | Sjálv | 38,2 |
| 3. | Sitting Bull | Svenning Reinert | Johan á Plógv | 38,7 |

**Tvíspor I flokkur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Sólvindur | Hans Pauli Poulsen | Sjálvur | 34,0 |
| 2. | Fram | Kristfríð Jacobsen | Júst Rubeksen | 34,1 |
| 3. | Lokkur | Gunrid á Plógv | Rólant Reinert | 35,3 |